**Vegleiðing um, tá húsdjór eru til ampa**

*Húsdjórahald v.m.*

Møguleiki er hjá bý- og bygdarráðum at skipa húsdjórahaldið í býum, býarlíkum bygdum og í meira býarlíkum býlingum.

Í kap. 8 í kg. nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvi stendur í § 23 um húsdýrahald, at í býum, býarlíkum bygdum og í meira býarlíkum býlingum kann bý- ella bygdarráðið gera av, at húsdýrahald ikki er loyvt uttan góðkenning frá bý ella bygdarráðnum.

Stk. 2 Um so er, at húsdýrahald, sum ikki er umfatað av kap. 5 i løgtingslóg um umhvørvisvernd, elvir til ampa, sum t.d. stink, gang, nógva flugu, nógva rottu, kann bý- ella bygdarráðið geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk til at fyribyrgja hesum, og í førum, tá ið ikki verður gjørt eftir boðunum, seta forboð fyri dýrahaldinum.

Kap. 5 í umhvørvislógini eru um serliga dálkandi virkir v.m.

Bý- og bygdarráðið hevur sostatt møguleika at avgera, at húsdýrahald ikki skal vera í býum, býarlíkum bygdum og í meira býarlíkum býlingum.

Bý- og bygdarráðið hevur møguleika at geva boð um, at neyðug tiltøk verða sett í verk at fyribyrja ampum, ið eru av húsdýrahaldinum. Ásetingin er ikki fullfíggjað og er orðingin t.d. stink, gang, nógva flugu, nógva rottu, dømi og vegleiðing um hvørji sløg av ampum, talan kunnu vera um. Talan kann soleiðis eisini vera um annan ampa.

*Hundar og húsdjór, ið ganga leys:*

Í hundalógini (LL. nr. 82 frá 19. juni 1990 um hundar) er ásett, at ikki er loyvt at hava hund gangandi leysan á gøtu, vegi, breyt o.t. sum eru opin fyri vanligari ferðslu uttan so, at hann er havdur í bandi ella við fólki, sum hevur fult ræði á honum.

Hundur kann ikki sigast at hava leiðara, bert tí hann er undir eftirliti frá ánarans húsum ella vinnustaðið.

Gongur hundur leysur uttan leiðara, sum hevur fult ræði á honum, kann løgreglan taka hann upp. Løgreglan boðar eigaranum av hundinum frá, at hundurin er upptikin.

Bý- ella bygdarráðið kann eftir samráðing við løgregluna seta eitt ella fleiri fólk, sum hava heimild at taka upp hundar. Viðkomandi kann vera í felag um fleiri kommunur.

Bý- ella bygdarráðið útvegar løgregluni hóskandi hølir ókeypis til upptiknar hundar og hevur skyldu at syrgja fyri, at hundarnir verða nóg væl røktir ta tíðina, teir eru í varðveistlu hjá kommununi. Fleiri kommunur kunnu vera í felag um hølini.

Eisini er í hundalógini ásett, at um hundur ger granna ónáðir, tí hann goyr ella hvínur og gevst ikki, kann kærast um hetta til løgregluna. Løgreglan kann geva honum sum hevur hundin boð um at hava hundin innilæstan. Um hetta ikki hjálpur ella um hundurin longu er innilæstur, kann løgreglan geva boð um, at beinast skal fyri hundinum.

Løgreglan kann taka upp húsdjór, ið ganga leys, eisini seyður og ross verða upptikin. Fráboðanir um, at húsdjór ganga leys, skulu gevast løgregluni.

Eigarin av djórinum kann frá hetta útflýggjað ímóti at rinda tær útreiðslur, ið hava verið av, at dýrini eru upptikin. Lýst verður á svørtutalvu, um løgreglan hevur tikið djór.

*Vetrarfriðing:*

Dømi eru um, at kommunur hava avtalað vetrarfriðing við hagaeigarar. Hetta hevur verið eftir nærri avtalu um, hvat skal vetrarfriðast og hvat endurgjaldið í hesum sambandi skal vera. Hagaeigarin vil eftir slíkari avtalu hava skyldu til at halda seyðin burturi úr bygdini ímóti endurgjaldi. Til slíka loysn krevst semja frá øllum pørtum, bæði um sjálva friðingina og endurgjaldið.

*Byggisamtykt:*

Kommunurnar hava møguleika til at tilrættaleggja økini í kommunini soleiðis at byggisamtyktin ásetur, hvat slag av bygging kann gerast og hvør nýtsla kann fara fram.

Kommunurnar hava soleiðis møguleika til at avgera, at eitt øki kann verða nýtt til landbúnað, alment frílendi og tílíkt soleiðis at slíkt virksemi verður lagt til eitt ávíst øki í bygdini ætlað til endamálið og ikki er aðrastaðni í bygdini.

Ætlaðu broytingar í byggisamtyktini skulu sambært byggi- og býarskipanarlógini lýsast og liggja frammi og skulu góðkennast av Landsstýrisfólkinum.

Byggisamtykin er tó galdandi fyri viðurskifti framyvir og t.d. ikki fyri tey økið har húsdjór eru áðrenn byggisamtyktin er góðkend.